# Sjúkrarøkarfrøðingar í 30 ár



*Sjúkrarøktarfrøðingarnir sum hittust leygardagin.*
***Aftara rað f.v.:*** *Súsanna Djurhuus, Eydna Hansen, Jórun Andreasen, Anna Maria Mortensen, Elinborg Danielsen, Kitty Wang og Anna Egholm.*
***Fremra rað f.v.:*** *Maibritt Mikkelsen, Malan av Reyni, Jastrid á Dul Sørensen, Elin Vitalis, Elisabeth Guttesen, Petra Henriksen og Nicolina Højgaard. Á myndini vanta Ida Sørensen, sum var við til hátíðarhaldið, og Rúna Jacobsen sum býr í Danmark*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tær sum tóku prógv á Sjúkrasystraskúla Føroya í 1979 hátíðarhildu leygardagin 4. apríl at 30 ár eru liðin síðan próvtøkuna.

Tær møttust leygarmorgunin í gomlu skúlahølunum á B75 á Landssjúkrahúsinum, har sum Heilsumálaráðið heldur til í dag. Har ótu tær morgummat og hugdu eftir gomlum myndum frá lestrartíðini.

Síðan gingu tær út til kirkjugarðin við Velbastaðvegin og løgdu blómur á grøvina hjá Kristinu Guttesen, ein av sjúkrasystrunum, sum andaðist í 1989. Eftir tað var farið í Norðurlandahúsið, har tær fingu ábit og hugdu eftir eini bindiframsýning, sum er har í løtuni.

Skipað var síðan fyri eini rundvísing í nýggja skúlanum hjá sjúkrarøktarfrøðingunum í J. Broncksgøtu. Um kvøldið var veitsla á Hotel Føroyum.

*mg*



**Aftasta rað frá vinstru:**
Anna Maria Mortensen Norðdepli, Jórun Biskopstø, Kitty Wang Leirvík, Nicolina Højgaard, Tórshavn og Petra Hansen Klaksvík.
**Í miðjuni frá vinstru:**
Elinborg Petersen Funningur, Anna M. Joensen Klaksvík, Rúna Jacobsen Tórshavn, Poula Poulsen lærarinna, Aurora Weihe lærarinna, Annelisa Winther lærarinna, Hildur við Høgadalsá lærarinna, Anna Maria Perssson lærarinna, Kristina Joensen Klaksvík, Jastrid á Dul Tórshavn.
**Fyrsta rað frá vinstru:**
Ida Sørensen Tórshavn, Súsanna Djurhuus Vestmanna, Malan Lenvig Kvívík, Eydna Hansen Tórshavn, Mai-britt Johannesen Vestmanna, Elisabeth Øregaard Fuglafjørður og Elin Vitalis Klaksvík.

*Mynd av nýklæktu sjúkrasystrunum og lærarunum í 1979*